# missa, er hugflogið




Pauli Nielsen, sum nú leggur frá sær sum rektari á Føroya Læraraskúla eftir at hava røkt starvið í 18 ár



*Bárður á Lakjuni, nýklæktur lærari, saman við pápanum, Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharra, sum eisini er lærari*




*Pauli Nielsen, rektari, saman við Elin Hentze í Stórustóvu, nýklæktum lærara*

fáa prógvið. Tað skulu tit sjálvandi hava fyri at fáa fast starv í fólkaskúlanum. Eg eri meira upptikin av, at tit fáa útbúgvingina sum tryggjar, at tit ikki geva børnunum steinar fyri breyð. Og soleiðis sum eg hugsi, so kunnu ov nógv líðug svør skjótt gerast tyngjandi steinar, men spurningarnir, ið verða settir av iva, vilja og í álvara altíð er breyðið, ið kann veita okkum orku at halda okkum uppi.

Eg sigi hetta, tí vit vita, at so at siga øll svør fyrr ella seinni vísa seg ikki at vera allur sannleikin.

Leiðarin á einum læknaskúla yviri í USA byrjaði fyri nøkrum árum síðani móttøkurøðu sína fyri teimum nýggju lesandi soleiðis:

»Tit skulu vita, at tá ið tit um eini fimm, seks ár eru líðug við útbúgvingina her hjá okkum, fer tað at vísa seg, at helmingurin av tí, sum tit hava lært er skeivt, og tað, sum er uppaftur verri, er, at vit vita ikki, hvør helmingur tað er.«

Fyri einum mánaði síðani høvdu vit her á skúlanum vitjan av heimskenda heilagranskaranum Morten Kringelbach, sum starvast í Oxford, og hann var uppaftur meira avgjørdur. Hann segði, at innan teirra øki mundi tað fara at vísa seg, at 90% av verandi vitanini fór at roynast skeiv, tá ið 10 ár vóru farin. Og kortini vita vit meira og meira.

Eg er tí líka so upptikin av, at útbúgving tekur tíð, sum av at tíð fer illa til spillis.

Bæði hava týdning, og eg haldi, at svenska skaldið Kaj Beckman er sera beinrakin, tá ið hann sigur soleiðis:

*Når man går fort*
*och tittar rakt fram*
*då kommer man fort fram.*
*Om man går langsamt*
*och tittar på alt ved vägkanten,*
*om man tar op en sten*
*ock luktar på en blomma*
*– då går det inte fort.*
*Men stenen och*
*blomman*
*har blivet ens vänner.*

Hetta man eisini vera galdandi fyri skúlatíðina.

Sjálvandi skulu vit gera alt fyri, at komandi ættarlið verða gagnligir borgarar, men vit mugu ikki gloyma, at børn eru javntverd við øll onnur medmenniskju, tí tey eru tey, og eingin annar.

Vit vaksnu kunnu ikki gera nakað, sum tryggjar hvussu tey verða sum vaksin, men vit hava øgiligt vald á teirra lívi, meðan tey eru børn. Børn eru virðismikil, tí tey eru hugsandi og kenslusamar verur.

Eg byrjaði við einum barni og kann tí hóskandi eisini gevast við einum øðrum, sum hevði fingið spurningi, hvussu vit skulu brúka lívið, og svarið var:

»Vit skulu ikki bara brúka lívið til at vera ríkur og koyra í dýrum bilum og reypa sær.«

Eg skal ynskja tykkum hjartaliga tillukku við próvnum og við útbúgvingini, sum tit vónandi hava ognað tykkum her á Læraraskúlanum.

Góða eydnu við lærarayrkinum. Tit fáa litið upp í hendi tað dýrasta, ið vit eiga. Tit fáa stórt vald.

Nýti tað við tí skili, sum ein pedagogisk útbúgving eigur at hava givið tykkum møguleika at menna.

Og takk øll tit á Læraraskúlanum, sum hava verið við til at útbúgva tykkum og skapa neyðugu umstøðurnar til trivnaðin hjá tykkum, sum her ganga.